Tv Televarpið
Fleiri rásir - einki roks

Á DR1 í kvøld kl. 20.30



# Cast Away

*Chuck má seta sær fyri at lívbjarga sær sjálvum og tað er ógjørligt at siga um nakar yvirhøvur fer at finna hann*



*Chuck Noland (Tom Hanks) endar á eini oydnari oyggj einastaðni í Stillahavinum eftir at flogfarið, ið hann var við datt niður*

Chuck hevur alt sítt lív verið ein trælur av klokkuni - eitt rættiligt nútímans menniskja, ið alla tíðina hevur skund. Men nú, eftir eina flogvanlukku er hann strandaður á eini oydnari oyggj, og tíðin er nú næstan tað einasta, ið hann hevur um hendi. Chuck Noland starvast trúliga fyri post- og vøruflutningsfelagið FedEx. Hann ferðast sera nógv í sínum starvi. Ta einu løtuna er hann á vesturstrondini í USA, næstu løtuna er hann í einum heilt øðrum landi. Hann svevur í flogfarinum aftur og fram. Restina av tíðini loysir hann trupulleikar, ið stinga seg upp í skundmikla postarbeiðinum, ímeðan hevur hann eygað á sekundvísaranum, tí posturin skal koma fram til ásettu tíðina. Júst heimafturkomin úr Moskva fær hann líka tíð til at kyssa unnustu sína færvæl á veg til næsta flogfarið. Hann lovar henni, at tey skulu halda nýggjársaftan saman, nú hann ikki fekk verið saman við henni um jólini. Hon gevur honum eitt ur í jólagávu. Flogfarið fer tvørtur um Stillahavið, og so gongur tað galið - onkustaðni har úti yvir Stillahavinum. Flogskipararnir hava mist tamarhaldið á flogfarinum og tað dettur niður. Chuck fær strítt seg upp á turt, men hann hevur ikki ánilsi av, hvar hann er. So við og við sær Chuck, at hann er endaður á eini oydnari oyggj, har einki menniskja í longri tíð hevur sett sín fót. Nú eru góð ráð dýr. Hann má seta sær fyri eyga at lívbjarga sær sjálvum á hesi oydnu oyggj, og tað er ógjørligt at siga um nakar yvirhøvur fer at finna hann. Í neyðini lærir hann seg at kynda eld, at byggja eina smáttu við pálmabløðum, at vinna sær føði og matgera. Somuleiðis er ein stór avbjóðing at halda sinnið frískt. Tí teknar hann á ein flogbólt, ið hann finnur við strondina, eygu, nøs og munn, nú hevur hann so onkran at tosa við.

**Tom Hanks í høvuðsleiklutinum**
**Fimm góðir við sama sjónleikara:**
- **Catch Me If You Can (2002)**
- **Saving Private Ryan (1998)**
- **Forrest Gump (1994)**
- **Philadelphia (1993)**
- **The Burbs (1989)**

# Barton Fink



Á Kanal 5 sunnukvøldið kl. 22.25

*John Turturo, sum høvundurin Barton Fink úr New York, ið verður biðin at koma til Hollywood at skriva eitt filmshandrit. Søgan fer fram í 1941*

Eftir eina sera góða móttøku á Broadway verður ungi og evnaríki handritahøvundurin Barton Fink (John Turturo) biðin um at koma til Hollywood. Tað er tann valdsmikli studiobossurin Jack Lipnick, ið ætlar at gera sær dælt av hesum unga talentinum. Men intellektuelli Barton heldur lítið um yvirfladisku tilveruna í sólríka Kaliforn-ia. Tá hann so fær uppgávuna, ið er at skriva eitt heilt stutt filmshandrit til eitt ítróttadrama um brotsmenn, læsir hann seg inni á lítla hotelrúminum. Men tað gongur sera striltið við at fáa nakað niður á pappírið. Hetta, hóast at íblástur er at finna á sjálvum hotellinum har hann býr. Gestirnir eru nevniliga nakað heilt fyri seg. M.a. tann løgni Charlie Meadows (John Goodman), ið sigur seg vera sølumann. Og so eisini stóra ímyndin hjá Barton, kendi høvundurin W.P. Mayhew (John Mahoney), ið eisini hevur sínar trupulleikar at dragast við. Mayhew hevur eina skrivstovudamu at hjálpa sær, Audrey Taylor (Judy Davis), ið so avgjørt hevur sítt siga, tá tað ræður um at skriva filmshandrit. Hon roynir eisini at geva Barton eina hjálpandi hond við hansara arbeiði.

**Leikstjórnað: Joel Coen**
**Fimm góðir av sama leikstjóra:**
- **The Man Who Wasn't There (2001)**
- **O Brother, Where Art Thou? (2000)**
- **The Big Lebowski (1998)**
- **Fargo (1996)**
- **Miller´s Crossing (1990)**



*Charlie Meadows (John Goodman) kemur í samband við Barton Fink*